FYLGISKJAL 3

Dátueftirlitið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 9. desember 2019
J.nr: 19/00244-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri:

**Viðvíkjandi.: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling og uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.**

Dátueftirlitið hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling og uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.

Dátueftirlitið hevur viðmerkingar til uppskotini.

Dátueftirlitið tekur undir við, at elektroniska undirskriftin verður tikin í nýtslu, so skjótt loysnin er tøk. Á henda hátt ber til at tryggja eitt tryggari støði í mun til fráboðanina frá pápanum umvegis teldupost, sum annars fer fram á ymiskum teldupostskipanum við ivasomum ella ongum tiltøkum at tryggja trúnað av samskiftinum.

Viðgerðin av upplýsingum um faðirskap er fevnd av persónsupplýsingalógini[1]. Sambært lógini skal viðgerðin av persónsupplýsingum verða skipað sambært nágreiniligum mannagongdum, sum greitt áseta, hvussu persónsupplýsingar verða handfarnar í sambandi við viðgerðina.

Serliga er tað meginreglurnar um gjøgnumskygni og trygd, sum Dátueftirlitið metir verða viðkomandi í hesum høpi. Famlijufyrisitingin skal sum dátuábyrgdari veita nøktandi kunning um viðgerðin og hartil hava mannagongdir fyri, hvussu ætlanin er at tryggja rættindi hjá skrásettum sambært kap. 6 og 7 í persónsupplýsingalógini.

Familjufyrisitingin skal umframt tryggja, at nøktandi trygdartiltøk eru sett í gildi og í verk, sum forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd til persónsupplýsingarnar, ella at tær verða misnýttar. Trygdartiltøkini skulu vera skjalfest og viðvíkja fyriskipanarligari, tekniskari og fysiskari trygd.

Vegna Dátueftirlitið

Hjørleivur Sørensen

[1] Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.